Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Ein spilopmakari fyllir seksti

Leygardagin verður fest og ballada ovarlaga í Varðagøtu í Havn. Á hjørninum har hendan gøta gerst granni við Mammulág, liggur heimið hjá Rasmus Rasmussen, klippara, trompetisti, húsavørði, lívsnjótara, menniskja og so nógv annað.

Tað er heilt ótrúligt at Rasmus ikki er eldri enn trýss, so bráður sum hann er. Hann kann simpulhen ikki fáa ov nógv av lívinum og tað kann ongantíð ganga ovskjótt. Tað er fartur yvir Rasmus, og hann útrykkir seg myndaliga, tá orð ikki strekkja til. Tosar hann um eina hurð, so stendur hann við henni í hondini, fatar tú ikki beinanvegin poengið.

Rasmus hevur livað í seksti ár, og hetta hevur hann gjørt upp á rekord tíð. Tað ber ikki til rættuliga at tosa um tíð sum nakað konstant og óvikiligt, tá tú tosar um Rasmus. Hann er eitt av teimum menniskjum, sum eru framman fyri sína tíð í orðsins rætta týdningi og tað fáa vit at kenna á egnum kroppi, sum dagliga eru kring hann, vit klára einfalt ikki at fylgja við.

Rasmus er ein eksplosión av energi og hann roynir altíð nýggj mørk. Hann er altíð í góðari tíð og frammanfyri tíðina, og tí gongur hann mangan og bíðar, tá onnur skulu gera seg til at gera okkurt.


*Rasmus er 60 ára gamal. Hann hevur livað hesi 60 árini upp á rekord tíð. Soleiðis sá hann út fyri viku síðan*

*Mynd: Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Rasmus er fyrstur at seta niður í havanum. Hann er fyrstur í allari Havnini og so má hann ganga og bíða til tað nælir og sprettir, nógv longur enn hini. Hann er fyrstur at lúka, hann er fyrstur at klippa trøini og meðan hann bíðar ótolin eftir at trøini vaksa so mikið, at tey kunnu klippast, so klippir hann litað pappír saman til vakrar urtagarðar, har hann sjálvur avgerð ferðina, hvussu skjótt vekstur, og hvussu langt er komið út á árið. Í klippirúminum hevur hann vald á náttúruni og avgerð sjálvur hvordan og hvorledes.

"Hvussu havi eg føtt hann," segði mamman einaferð uppgevandi í einum føðingardegi, tá fylti støvsugaraposin skrædnaði og endaði á gólvinum. Hann skuldi vísa gestunum hvussu man skiftir ein slíkan, í nýggja instutiónsstøvsugaranum, sum hann júst hevði keypt, og sum var so máttmikil, at hann seyg alt sum ikki var neglt fast. Gestirnir vóru tvangsinnlagdir at hoyra hvørja detailju um hendan støvsugara og at royna hann eisini.

Jólagardinurnar koma upp fyrst í november, ella í hvussu er eitt sindur áðrenn øll hini og tær eru eisini fyrst niðri aftur, tí tær hava hingið so mikið nógv longri enn hinar í Havnini, at hann er vorðin so inniliga troyttur av kramarhúsum, gurliandum og nissum, tá nýggjárið bankar á dyrnar.

Lucky Luke er kvikari enn sín egni skuggi og Rasmus er har upp í móti. Tá vit fóru út í verðina fyri átta árum síðan skuldi heimið hjá okkum tømast. Í stovuni stóð ein høgur kaktus, næstan mannshædd, døkt grønur, lúnskur og vandamikil. Forfedrar hansara høvdu stungið frá hond alt í kom í nánd á eini trøð niðri í oyðimørkini í Tunis, hagan Mouldi Manai er ættaður. Køttur okkara og øll onnur við vanligari respekt fyri sær sjálvum virdu og óttaðust kaktusin. Rasmus vildi hava beistið niðan í Mammulág og sum tað allarseinasta vit fluttu úr húsunum var hesin tornuprýddi vøkstur. Eg stúrdi fyri hvussu vit skuldu fáa hann út, men eg slapp ikki at stúra. Áðrenn eg visti av, kom Rasmus sum ein hvirluvindur inn í stovuna, tók við báðum ørmum um kaktussin, snaraði á gólvinum og steðgaði ikki aftur fyrr enn úti á trappuni, bannandi: "Forhelviti sum hetta stingur, vit mugu balla hann inn í okkurt, ikki sannheit, Jústinus," segði Rasmuss og pilkaði nakrar tornur burtur úr bringuni. Eg nikkaði samtykkandi.

Rasmus er stórt menniskja. Han er vinur vinnana og hann hevur stórt hjarta, vit støðga her við hesum evninum og tosa ikki um hvussu hann taklar sínar óvinir. Tað er líkasum ein onnur søga. Hann er húsavørur á nógvum stovnum hjá andveikraverndini í Havn og uttanfyri við. Hann veit alt um pedagogar og hevur vist nokk eisini eina meining um teir, eina avgjørda meining. Tað var nú ikki sum húsavørður at hann á fyrsta sinni kom í samband við tey veiku í samfelagnum. Hann starvaðist við tarnaður fólkum niðri, áðrenn hann tók táttin upp í Føroyum og í Rasmussi hava tey veiku ein góðan verja. Vága tær at tosa niður um tey brekaðu og Rasmus fer í fimta gear beinanvegin og hvassa tungan fær teg at angra, at tú talaði.

Rasmus er av áhugaverdari familji í báðar ættir og hann veit av tí. Og hann hevur eina næstan forkelaða og eitt sindur dempaða snobbkenslu mótvegis tí fínu Restorff familjuni, sum seinastu øldina hevur staðið fyri einum parti av tí útlendska íslettinum í høvuðsstaðnum. Tað er ikki heilt uttan errinskap, at hann greiðir frá langabbanum sum bakaði fyrsta wienarbreyðið í Føroyum fyri yvir 100 árum síðan. Hvør át hetta vinarbreyðið sigur søgan einki um og granskarar klóra sær í nakkanum, júst tí hetta ledið í føroyskari siðsøgu er horvið. Føroysk siðsøga fær aðra vend, tá hetta kemur fyri ein dag. Og so snerkir hann eitt sindur, tá spurt verður um hina familjina, sum er fast ankrað í abban, Rasmus á Háskúlanum, íð hann er uppkallaður eftir. Og um Rasmus á Háskúlanum melir tann gamla eitt sindur stirvna, ræsta og grótføroyska mentanin sum í allari almindiligheit og eisini í allari beskeðinheit fær føðingardagsbarnið at snerkja eitt sindur, uttan tó at missa loyalitetin mótvegis vágafamiljuni heilt á gólvið. Nei, abbasonur annan háskúlamannin hevur arvað nøsina frá upphavsmanni tí fyrsta føroyska wienarbreyðsins, gamla Restorff, hvørs genir ganga aftur til týskar jødar í Týskalandi í 19. øld og hagani heilt aftur til patriarkin Ábraham gamla.

Rasmus er ikki sloppin ómerktur gjøgnum lívið. Hann hevur fingið og mist, fingið og mist og fingið aftur. Hann hevur mist dýrt, enntá sitið sum einkjumaður við tveimum børnum, men hann hevur fótað sær aftur. Flisar eru farnar av honum, men bulurin er eftir. Nú hevur hann ment seg til eldri mann við grásprongdum hári og skeggi, fullur av lívsroyndum og einum øgiligum appetitti eftir tí sum liggur fyri framman og sum hann enn ikki veit hvat er. Og nú eru sjey ár til aldursrentuaftan og Tilhaldið.

Nær fer Rasmuss at minka um ferðina, nær fer hann at slappa av, neyvan fyrr enn hinumegin, tá hann fer at síggja lívið í slow motion á einum himmalskum videofilmi. Og andaligur er Rasmus eisini, hóast vit í allari almindiligheit ikki seta hann so nógv í samband við tað, so upptikin hann er av lívinum her og nú. Men hann spekulerar nógv upp á hvussu tað fer at vera í ævinleikanum, og hvørjum man fer at vera saman við har, soleiðis í tí dagliga og kanska av og á í tí drúgva og endaleysa degi, har tíðin stendur í stað í ævinleikanum.

Og Rasmus spekulerar eisini upp á Gud og setir sær tungar spurningar, sum ongin enn hevur verið førur fyri at svara: "Ikki sannheit Jústinus. Also hygg her! Eg havi fingið lívið sum gávu og mín skrekkur hevur alt mítt lív verið at farið óbrúktur higani. Fyristilla tær nú Jústinus, tá eg nú standi framman fyri Várharra og hann sigur við meg. Jamen Rasmus, eg gav tær lívið og tú kemur aftur til mín og talvan er heilt rein, hvat hevur tú gjørt har niðri, hevur tú slett ikki livað. Hevur tú ongantíð mistikið teg, so hevur tú heldur ikki livað. Tað má í hvussu er ikki henda." Hann gerst heilt tómur í andlitinum, tá hendan ramsan kemur fram eini tvær til tríggjar ferðir um árið.

Rasmus gongur við lív og sál upp í alt hann tekst við. Og tá eg skrivi alt, so meini eg alt. Tað tók høvuðsstaðnum drúgva tíð at koma seg eftir seinastu royndina hjá Rasmussi at leggja av at roykja. Hann royndi við einum italienskum plástri og hvørt menniskja sum kom honum í nánd slapp at síggja hansara líðing og hansara pínda tilklistraða likam, meðan hann næstan ørur av abstinensum misbrúkti tunguna til Nicorette í staðin fyri at guva. Tað fór ein lætti um havnargøtur, tá fólk sóu at Rasmus aftur hevði fest sær í.

Og so var hann arkitektur, byggiharri og húsasmiður fyri einum høsnarhúsi, sum hann smíðaði fyri systrina og tá fingu vit alt at vita um hønur, um skvøtt, um hanar, um fjaðursárheit og korn heilt til hann sjálvur gjørdist troyttur av eggum og øllum tí sum har til hoyrir, eggjakøku og gessi íroknað.

Rasmus er skemtari og hann dugir væl at fortelja eina góða. Sum skemtari, so grínir hann heldur ikki um tú sjálvur fortelir honum eina góða. Hann goymir láturin til seinni. Tá tú fortelir, so hálar hann allarhægst eitt lítið sindur í smílibondini. Seinni fer hann beint í býin og á Konditaríið og tá fortelir hann søguna sum sína egnu og Gud náði tann sum ikki grínir tá. Eg skal heilsa og siga hetta er galdandi fyri allar skemtarar eg kenni og teir eru slett ikki so fáir.

Leygardagin verður fest og ballada í heiminum hjá Rasmus í Mammulág. Mamman Rigmor fer at sita har sum ein drotning og drekka sjokolade, og tosa um arbeiðskonur og fólk sum hon kendi og sum ikki eru á lívi longur. Mammubeiggin Trygvi fer at fortelja onkra góða sum tann frálíki frásøgumaður hann er og Restorfffamiljan sum heild fer at meta um dygdina av køkunum við sonnum kennara smaksleykum, ið hava ment seg øld eftir øld heilt aftur til heilaga landið. Háskúlafamiljan fer allarhelst at tevja meira eitir tí turra kjøtinum og tosa um glarfiti og hagagóð krov, um feitar rullipylsur og rakar rullupylsur. Og so verða tað so nógv onnur eisini, sum fara at heilsa upp á føðingardagsbarnið, tí fólk kennir hann nógv og væl dugir hann saman við fólki, um hann sleppur framat.

Kemur tú framvið Mammulág leygarkvøldið, so gerst ikki skakkur um tú sær eitt petti av Tivoli soleiðis mitt í Havnini. Urtagarðurin er nevniliga innilokaður i dagens andledning og fjátursstungnar ribes og aðrar plantur óttast dómadag, nú dagljósið so knappliga er tikið frá teimum. Men tað er bara tí at Rasmus fyllir seksti og tað kunnu tær sjálvandi ikki vita.

Kanska hoyrir tú trompetblástur, tá hann fer at floyta og tað ger hann allarhelst av og á hetta kvøldið, tí hann kann ikki rættuliga gera við tað, hann má floyta tá lagið fer upp um eitt vist á skalaðinum til garvillan villan jubil. Og spælimaður er hann, tó ikki fortaptur.

Og við hesum reglum skuldi eg sloppi undan at hildið talu á føðingardegnum, tað er so forbankað ringt at siga nakað meiningsfult um góðar vinir. Tillukku við degnum Rasmus.

**Jústinus Leivsson Eidesgaard**



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# Marilyn Eloise Fryback

## 11 May 1919 – 28 March 2004 Age 84



Marilyn always said with a smile that she was born "in college". Indeed, she was born in the rented apartment of her parents, George H. and Monta Fay Perry, on the second floor of the building that housed the Tobin College Business School in Ft Dodge, Iowa.

She was raised in Nebraska and Kansas. At the age of 8, she went to live briefly with her grandmother in Colby, Kansas, where she met the boy across the street, 3rd grader and future husband, Bill Fryback. It was the custom in those days that on the first of May a boy would leave a "May Basket" at the door of his sweetheart. The boy was supposed to dash away to avoid being kissed. Bill, however, intentionally fell down so he could collect his kiss!

Marilyn eventually earned an AA degree in secretarial science. On 19 Dec. 1943, she married Bill, home on two-weeks leave from the army. She was a full-time mother of five children until 1961, when she returned to her career as executive secretary, retiring in 1990 as secretary to the Head of the Russian Language Division at the National Defense Language Institute, in Monterey, California.

She was a gifted pianist, singer, candy-maker, seamstress, and a willing volunteer at her church and her children's schools. Her grandchildren will forever remember her home-baked cinnamon rolls! Summer camping trips were a family tradition and she and Bill took the children all over the Pacific Northwest and California. Marilyn and Bill were also active square dancers.

In 1996, they moved to Willamette View Retirement Center in Portland, Oregon. Marilyn and her devoted husband took long walks nearly every day. In December 2000, suffering from Alzheimer's Disease, Marilyn moved into the Center's long-term care unit, after Bill could no longer care for her in their home.

Marilyn, perhaps in step with her childhood sweetheart and husband of 60 years, passed away just 12 days before her husband. She is survived by an older brother, Gene Perry; son Dennis G. Fryback and daughter-in-law Judy Fryback of Madison, Wisconsin; son Alan L. Fryback and daughter-in-law Addis Fryback of Macau, China; son Dale M. Fryback and daughter-in-law Gloria Fryback of Bridgeman, Michigan; daughter Monta Lynn Reveal and son-in-law Michael Reveal of Tórshavn, Faroe Islands; daughter Beth A. Fryback of Bellingham, Washington; 10 grandchildren; 3 great-grandchildren, and many nephews and nieces in Oregon, Washington and Colorado.

# William H. Fryback

## 23 July 1920 – 9 April 2004 Age 83



Bill was the middle of three sons born to Herbert and Lenora (Logan) Fryback. Raised in Colby, Kansas (where he met his wife-to-be at the age of 8), he completed high school in Colorado Springs and attended Colorado College on a scholarship, majoring in biology. He was a talented diver on the swim team. As a soldier in WWII after seeing destitute street children, he was inspired to pursue a career in education.

Bill married Marilyn Perry while on a two-week military leave in 1943. Their family soon grew to five children. Bill taught biology, physiology and zoology and coached high school athletic teams. Eventually, he won a National Science Foundation Fellowship and earned a PhD in general science. He was always intrigued by what constituted an optimal learning environment and worked all his life in curriculum development. He retired as the Associate Director of Research and Biofeedback Services at the Behavioral Science Institute of Monterey, California.

Bill and Marilyn moved to Vancouver, Washington, in 1990, where they were active in their church and continued their long enjoyment of square dancing. In 1996, they moved to Willamette View, a continuing care retirement community in Portland, Oregon, located on a highpoint overlooking the Willamette River.

Bill was always an active participant in community life everywhere he lived. His sense of humor and genuine love of people made him the friend of all. His lifelong passion for learning and teaching was inspirational. By 1998, Bill had become full-time caregiver of his beloved wife who was suffering from Alzheimer's Disease. He continued to visit her twice a day even after he could no longer care for her in their apartment.

In January 2004, Bill was diagnosed with pancreatic cancer and passed on 12 days after the death of his beloved wife. He is survived by brother Richard E. Fryback, Durango, Colorado; son Dennis G. Fryback and daughter-in-law Judy Fryback of Madison, Wisconsin; son Alan L. Fryback and daughter-in-law Addis Fryback of Macau, China; son Dale M. Fryback and daughter-in-law Gloria Fryback of Bridgeman, Michigan; daughter M. Lynn Reveal and son-in-law Michael Reveal of Tórshavn, Faroe Islands; daughter Beth A. Fryback of Bellingham, Washington; 10 grandchildren; 3 great-grandchildren, and many nephews and nieces in Oregon, Washington and Colorado.

# Til minnis um
# Obert Eliasen



Í august í fjør andaðist Obert Eliasen í Fuglafirði, 80 ára gamal.

Áhugamál hansara spentu sera víða, alt frá lokalpolitikki, mentan, siðsøgu og samfelagsviðurskiftum.

Sum ungur arbeiddi Obert í handils- og reiðaravirkinum hjá S.P.Petersen í Fuglafirði, fyrst sum ørindadrongur, og seinni í handlinum, á skrivstovuni og skipaavgreiðsluni.

Mitt í 50´unum stovnaði hann Spinnaríið, og seinni gjørdist hann kommunuskrivari. Eisini var hann bygdaráðslimur. Hann hevði handil, har hann seldi radiotól, barnavognar, súkklur, happadráttarseðlar og teknaði tryggingar.

Hann var ein av stovnarunum av ÍF. Var ein av rithøvundunum av bókini Brot úr Fuglafjarðar søgu og var limur í gøtunavnanevndini í Fuglafirði.

Honum vóru litin til fleiri álitisstørv, m.a. sat hann í umboðsnevndini fyri SEV og í stýrinum fyri Klaksvíkar Sjúkrahús í útvið 40 ár.

Siðsøguligi áhugi hansara hevði eisini við sær áhuga fyri ættarsøgu. Hann nýtti nógvar fríløtur til ættargransking. Eisini málaði og yrkti hann.

Obert var íðin sambandsmaður. Hann var ein av stigtakarunum og stovnarunum av valfelagi Sambandsfloksins í Eysturoynni Samhald.

Tey fyrstu árini eftir stovningina vóru í mangar mátar tung fyri valfelagið. Fyrsta valskeiðið doyðu tveir av tinglimunum og nýggj umboð skuldu finnast. Men sum fráleið fótaði flokkurin sær aftur í Eysturoynni, soleiðis, at Eysturoyggin nú í langa tíð av monnum hevur verið kallað háborg Sambandsfloksins.

Øll hesi árini var Obert við í nevndini í Samhald, og sigast kann, at hansara partur lá ikki eftir í nevndararbeiðinum. Obert var tann síðsti av stovnarunum, sum hevur sitið øll árini í nevndini - í meiri enn 40 ár!

Havi sjálvur altíð kent Obert, við tað, at hann var giftur pápasystur míni. Sum barn var tað altíð ein fragd at koma í føðingardagar í heiminum hjá Obert og Judith.

Lívsjáttandi var Obert sum fáur. Honum untist at hava førleika og rímuliga góða heilsu til tað síðsta.

Vit takka Obert fyri alt hansara ídni og fyri alt, hann var fyri okkum, sum untust at kenna henda fryntliga mann.

Ærað veri minnið um Obert Eliasen.

**Samhald**
**Johan Petersen, form.**